Verkhúsið Stíggjur 25 ár
9. oktober 2018

Góðu øll sum saman eru komin her í dag,

Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum! Og takk fyri, at eg eri boðin við at hátíðarhalda henda stóra dag saman við tykkum.

Nú er tað ikki so langt síðan, at eg var her seinast, og tað var ein sera gevandi vitjan vit í Javnaðarflokkinum høvdu tá.

Eg havi glett meg at koma aftur at heilsa uppá tykkum øll, og eg rokni við, at tit eisini hava glett tykkum nógv til henda dagin.

Tá Verkhúsið Stíggjur kom her í Saltangará vóru nøkur onnur líknandi tilboð komin kring landi, í Havn við Verkstaðnum Vón, Verkstaðurin í Brekku í Klaksvík, Verkstaðurin á Bakka í Vági. Hesi verkstøð hava øll á sín hátt verið slóðbrótandi, tí hesi tilboð bygdi á hugmyndina, at øll menniskju eru nakað serligt.

Í Verkhúsinum er virðingin fyri tí einstaka treytaleys – og uttan mun til hvørjar avbjóðingar ella avmarkingar tú hevur. Filosofiin er, at tú kanst nakað, tú ert nakað og at tínar dygdir gera mun í felagsskapinum.

Søguliga sæð hevur hetta eisini verið leiðstjørnan í sosialpolikkinum. Í mong ár tyktist hugburðurin tó at vera, at fekst tú peningaligan stuðul, so var alt gott. Men tú mennist ikki og vinnur ikki lívsgóðsku við at sita við hús, uttan at vera virkin. Tað gevur snøgt sagt ikki meining.

Nú er tíbetur vent í holuni. Nú er hugburðurin at vit vilja geva fólki nakað at liva fyri, og ikki bara – sum fyrr – at liva av.

Í hesum høpi er Verkhúsið Stíggjur ein sólskinssøga. At koma á Verkhúsið at arbeiða, at vera við til at skapa vakrar lutir, og vera partur av einu góðum felagsskapi, er við til at geva lívinum innihald og góðsku. Og hetta hevur verið hornasteinurin hvønn tann einasta dag í 25 ár her í Verkhúsinum.

Her geva starvsfólkini tí einstaka ábyrgd og kensluna av, at júst tað tú fæst við, hevur týdning. Uttan øll tykkum dugnaliga, nærløgdu og kærleiksfullu starvsfólk, var einki Verkhús.

Tí fari eg at nýta hetta høvið at takka tykkum øllum, sum eru ella hava verið starvsfólk her, hjartaliga fyri tykkara stóra lut í hesum arbeiðið.

Tit skapa umstøður og fortreytir fyri upplivingum, eitt nú við tiltøkum og útferðum. Tit menna brúkarnar sosialt, so hann mennir síni evnir at fylgja við í samfelagsliga rákinum og menningini.

Tit stimbra teirra førleikar til at velja og vraka, so tey sjálvstøðugt kunna taka avgerðir og avbjóðingar, og gera tað møguligt. Og vera til hjálp hjá teimum brúkarum, sum ynskja at koma út á vanliga arbeiðsmarknaðin.

Og hetta gera tit við stórari virðing í gerandisdegnum og við viðurkenning fyri brúkaranum. Alt í einari hárfínari javnvág millum at veita tryggleika og at eggja fram sjálvbjargni hin einstaka.

Við hesum fáu orðum vil eg enn einaferð ynskja tykkum eitt hjartaligt til lukku.

Takk fyri og framhaldandi góðan føðingardag.

Eyðgunn Samuelsen

Landsstýriskvinna í almannamálum